## Finn hjálparvenjari hjá VB/Sumba

Finn Johannesen virkar nú sum hjálparvenjari hjá besta liðnum hjá VB/Sumba. Tað skrivar heimasíðan hjá VB. Finn Johannesn hevur áður virka sum ungdómsvenjari í eitt nú KÍ og B36, men nú hjálpir hann Ole Andersen við Formulaliðnum hjá VB/Sumba. Umframt hesa uppgávu er Finn Johannesen eisini annar av venjarunum hjá U17 landsliðnum hjá FSF.

## Hvat segði Matarazzi



Nógvar gitingar eru nú um, hvat italski spælarin Marco Matarazzi skal hava sagt við Zinedine Zidane, áðrenn franski stórspælarin stútaði hann í bringuna. Fólk, sum duga munnlestur, hava givið síni boð um, hvat varð sagt, meðan onnur vísa til søgur, sum hava gingið eftir dystir. Onkur vil verða við, at Matarazzi kallaði Zidane fyri ein terrorist. Ein italskur serfrøðingur heldur, at Matarazzi segði, at hann ynski Zidane og familju hansara ein andskræmiligan deyða. Zidane hevur umvegis umboðsmann sín boðað frá, at hann seinni í vikuni fer at greiða frá, hvat hendi, tá ið hann fekk reyða kortið í HM-finaluni.

# upp á tveir mátar



*Klaksvíkingur er undan tveimum teimum síðstu kappingunum stórfavorittur at vinna FM. Eysturoyingar ætla sær ikki at leggja kongin í kappingini. Men teir hugsa ikki um FM heitið*

*Mynd. Álvur Haraldsen*

Klaksvíkingur hevur vunnið tvær ferðir móti okkum. Tað stendur altso 2-2, og tað eru tvær kappingar eftir. Í okkara verð telur róðurin á Skálafjørðinum ikki við. Tá kappróðu vit als ikki, verður sagt umborð á Eysturoyingi.

**Staðfesta at teir eru best**

Eingin fer at taka fyrsta FM heitið nakrantíð frá Klaksvíkingi. Men sjálvandi fara teir har umborð at gera alt, sum tað ber til at gera, fyri at staðfesta, at eisini í kapprógving við næsta kappingarneytan er Klaksvíkingur bestur. Tað er altso framvegis nógv eftir at vísa og kappast um.

Unga manningin umborð á Vestmenningi vísti við at vinna triðja plássið, at tað er góður møguleiki fyri, at Vestmenningur um ikki so langa tíð aftur fer at verða á aldukambinum. Fjórða plássið hjá Havnarbátinum var enn eitt vónbrot í róðrarárið, sum heilt má roknast at vera miseydnað, tá ið hugsað verður um søguna hjá bátinum og ætlanirnar og vónirnar fyri hesum árinum.

Skálabáturin og Nólsoy-ingurin vóru í tættari kapping um fimta plássið. Teir komu á mál lítla bátslongd aftanfyri Havnarbátin. Vágbingur, sum framvegis er stigaleysur, var aftastur.

# Starturin hevur alt at siga

**Eftir fjórða sigurin á rað skal vilja heilt illa til hjá Ritu dreingjunum, um FM heitið skal gleppa teimum av hondum**

**Úrslit 5-mannafør dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ritan | 04:58.09 |
| 2 | Jallurin | 04:59.03 |
| 3 | Sílið | 05:00.15 |
| 4 | Kollur | 05:00.19 |
| 5 | Strípan | 05:03.00 |
| 6 | Havfrúgvin | 05:06.03 |
| 7 | Drekin | 05:09.14 |
| 8 | Blikur | 05:26.01 |

5-MANNAFØR DREINGIR

*Jóannes Hansen*

Tað gongur strúkandi hjá dreingjunum umborð á Rituni norðuri í Sundi. Í Vestmanna vunnu teir fyri fjórðu ferð á rað. Á Norðoyastevnu endaðu teir á triðja plássi. Síðani hava teir vunnið hvørja ferð, og undan tveimum teimum seinastu kappingunum eru teir seks stig frammanfyri Jallin, sum er einasti møguligi kappingarneytin til FM heitið.

Ritan fekk saman við Kolli, Sílinum og Jallinum besta startin. Ritan legði seg skjótt framum hinar. Jallurin royndi at bjóða av í endaspurtinum, og munurin millum teir báðar fremstu var ikki meiri enn lítil hálv bátslongd, og tað var ikki leyst aftur til Sílið og Koll á triðja og fjórða plássi. Men á málinum var tað kortini eingin ivi um, at Ritan hevði hildið tørn um fremsta plássið, sum teir tíðliga í róðrinum høvdu vunnið sær.

Strípan av Strondum, sum í Vági gjørdi orduligan vørr, og harvið lá mitt í feltinum í Vestmanna, gjørdi ongar skreytir hesa ferð. Hon endaði á fimta plássi og var meiri enn tvær bátslongdir aftanfyri Rituna.

Starturin hevur sambært rógvararnar á Rituni alt avgerandi týdning:

– Vit leggja nógv fyri í strembanini beinanvegin at taka okkum framum hinar. Tað er lættari, tá ið tú hevur kappingarneytarnar aftanfyri. So ræður um at halda og økja, og í endaspurtinum geva vit alt, sum vit eiga, er einfalda uppskriftin. Men hon hevur higartil verið effektiv.

Ritudreingirnir vilja ikki renna undan, at teir nú eru favorittar at vinna FM:

– Tað sær gott út. Men vit ætla ikki at hvíla á sigrunum í undanfarnu kappingunum. Nú hava vit fokus á Vestanstevnuni. Har ætla vit okkum eisini at gera alt, sum tað ber til, fyri at fáa fulla úrtøku.



*Tað gongur strúkandi hjá dreingjunum umborð á Rituni norðuri í Sundi, og í Vestmanna vunnu teir fyri fjórðu ferð á rað*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Stephan stýrir úr Oxford

**Tað var ikki fyrrenn eftir Jóansøku, at Klaksvíkingur fór at venja stutta teinin soleiðis, sum hann eigur at verða vandur**

10-MANNAFØR

*Jóannes Hansen*

Tað eru nógvir størri og smærri lutir í globaliseraða veruleikanum, ið skulu ganga upp í hægri eind, um tað skal eydnast soleiðis, sum teir umborð á Klaksvíkingi ætla og vilja, at tað skal gera.

Fram til Norðoyastevnu vandu teir mest sum bara á maskinum. Síðani hava teir vant í bátinum. Tað er Stephan Mølvig, danski OL gullvinnarin, sum síðsta árið hevur búð í Oxford í Onglandi, sum sigur teimum umborð á Klaksvíkingi, hvussu teir skulu venja.

Stephan róði við Nevinum Reyða í fjør, og tá var hann týðandi liður í góðum dagsskránni í neystinum í Klaksvík. Hóast hann nú er burtur úr Klaksvík, so hevur hann varðveitt sambandið á so mangan hátt, og hann er spentur, tá ið tað verður kappast:

– Stephan lurtar eftir Útvarpi Føroya á netinum, tá ið tað er kappróður, so hann veit, hvussu tað gongst hjá okkum, sigur Svein Rógvi Nielsen, bátsformaður umborð á Klaksvíkingi.

Eftir jóansøkuróðurin var niðurstøðan í Klaksvík, at talan hevði verið um svipsara:

– Kanska var talan um misskiljing. Vit fóru ov seint undir at innrætta venjingina til at rógva á túsund í staðin fyri á 2000 metrum. Hetta hevur fyrst og fremst við ferðina ella tempoið at gera. Í Vestmanna kendu vit beinanvegin, at tempoið var soleiðis, sum tað skuldi.

– Súkklarar plaga at siga, at teir hava góð bein, tá ið tað gongur væl. Umborð hjá okkum kendu vit allir leygardagin, at tøkini vóru, sum tey skuldu vera. Í Vági vóru vit ov títtir. Síðani hava vit vant og vant fyri at fáa róðurin at verða meiri seigan. Tað eydnaðist í Vestmanna. Harvið fingu vit tað gagnið burturúr nógvu venjingini, sum skuldi til fyri at vinna, sigur Svein Rógvi Nielsen.